## Støðan 1. Deild kvinnur

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 3 | 3 - 0 - 0 | 94 | 57 | 37 | 6 |
| 2 Stjørnan | 3 | 3 - 0 - 0 | 93 | 68 | 25 | 6 |
| 3 Neistin | 3 | 2 - 0 - 1 | 75 | 57 | 18 | 4 |
| 4 VB | 3 | 2 - 0 - 1 | 71 | 62 | 9 | 4 |
| 5 Sóljan | 4 | 1 - 0 - 3 | 91 | 99 | -8 | 2 |
| 6 Kyndil | 4 | 1 - 0 - 3 | 90 | 117 | -27 | 2 |
| 7 StÍF | 4 | 0 - 0 - 4 | 69 | 123 | -54 | 0 |

## Støðan 1. Deild menn

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 3 | 3 - 0 - 0 | 91 | 64 | 27 | 6 |
| 2 Neistin | 3 | 3 - 0 - 0 | 77 | 74 | 3 | 6 |
| 3 H71 | 2 | 2 - 0 - 0 | 55 | 48 | 7 | 4 |
| 4 StÍF | 3 | 1 - 0 - 2 | 76 | 79 | -3 | 2 |
| 5 Kyndil | 4 | 1 - 0 - 3 | 92 | 103 | -11 | 2 |
| 6 Tjaldur | 2 | 0 - 0 - 2 | 48 | 52 | -4 | 0 |
| 7 KÍF | 3 | 0 - 0 - 3 | 71 | 90 | -19 | 0 |

## Máltindurin

| kvinnur | | | |
|---|---|---|---|
| Asta Petrauskine | Sóljan | 43 | (5) |
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 40 | (9) |
| Gabriella Fekete | VB | 33 | (4) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 29 | (11) |
| Annika Ljósstein | Kyndil | 22 | (5) |
| Súnfríð Jacobsen | StÍF | 21 | (10) |
| Ileana Manulescu | StÍF | 20 | (2) |
| Birita Wardum | Neistin | 18 | (1) |
| Ioana Rápa | VÍF | 18 | (4) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 18 | (6) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 16 | |
| Regina Radó | VB | 16 | (4) |
| Gunnleyg Berg | Neistin | 15 | |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 15 | |
| Andrijana Milodanovic | Stjørnan | 15 | (2) |

| menn | | | |
|---|---|---|---|
| Jónleif Sólsker | Kyndil | 30 | (12) |
| Sámal Joensen | VÍF | 23 | (3) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 23 | (6) |
| Jacob Jónsson | Neistin | 22 | (1) |
| Heini Joensen | Neistin | 19 | (4) |
| Ingi Olsen | VÍF | 18 | (3) |
| Høgni Klein | Kyndil | 17 | (2) |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Neistin | 17 | (4) |
| Iljan Topic | KÍF | 15 | |
| Mortan Hansen | Tjaldur | 14 | |
| Sverri Justinussen | Tjaldur | 14 | (2) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 14 | (5) |
| Regin Petersen | KÍF | 12 | |
| Dorica Tomic | KÍF | 12 | (1) |
| Bjarni Wardum | H71 | 12 | (3) |

## Meistaradeildin kvinnur

**Dráttur-TB 0-3**
**ÍF-Fleyr 3-0**

| | d | v-t | sett | stig |
|---|---|---|---|---|
| TB | 2 | 2-0 | 6-0 | 4 |
| ÍF | 2 | 1-1 | 4-3 | 2 |
| Dráttur | 2 | 1-1 | 3-4 | 2 |
| Fleyr | 1 | 0-1 | 0-3 | 0 |
| Mjølnir | 1 | 0-1 | 0-3 | 0 |

### Komandi dystir:

27/10: Fleyr-Dráttur
28/10: Mjølnir-ÍF

## Meistaradeildin menn

**Fram-SÍ 3-1**
**ÍF-Fleyr 0-3**

| | d | v-t | sett | stig |
|---|---|---|---|---|
| Fram | 2 | 2-0 | 5-3 | 4 |
| Fleyr | 1 | 1-0 | 3-0 | 2 |
| SÍ | 2 | 1-1 | 4-3 | 2 |
| Mjølnir | 1 | 0-1 | 2-3 | 0 |
| ÍF | 2 | 0-2 | 0-6 | 0 |

### Komandi dystir:

27/10: Fleyr-SÍ
28/10: Mjølnir-ÍF

Sóljan-Kyndil 24-25 (13-11):

# 15 mál vóru ov lítið



*Asta Petrauskiene, sum her sæst uttast til høgru, skeyt 15 mál fríggjadagin, men hetta var akkurát ov lítið til at basa Kyndli*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Sóljuspælarin Asta Petrauskiene var ein einmansherur móti Kyndli og skoraði 15 ferðir, men Lotte Sørensen syrgdi fyri, at Kyndil vann dystin í Vágum, hóast havnaliðið var aftanfyri stóran part av tíðini**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Dysturin millum Sóljuna og Kyndil, sum varð spældur í Vágum fríggjakvøldið, var tættur og spennandi. Kyndil var aftan fyri stóran part av tíðini - í seinna hálvleiki eina løtu við fýra málum - men seinastu 20 minuttirnar av dystin syrgdi Lotte Sørensen fyri, at høvuðsstaðarliðið fekk øll stigini við sær til Havnar aftur.

Tað gekk javnt fyri seg alla tíðina. Kyndil legði seg fram um í teimum fyrstu 15 minuttunum, men so vendist leikgongdin, og heimaliðið kom rættiliga fyri seg.

Miðskeiðis í fyrra hálvleiki var knappliga vent í holuni, tí við fýra málum á rað fór Sóljan frá 5-7 til 9-7. Hesa løtuna steðgaði álopsspælið hjá Kyndli upp, og tað var ikki fyrr enn Anja Johannesen við tí fyrra av sínum tveimum málum skoraði til 9-8, at Kyndil koblaði íaftur.

Sóljan helt seg tó framman fyri restina av fyrra hálvleiki, og tá liðini høvdu hálvleikssteðg var støðan 13-11 til Sóljuna.

### Lotte lykilin

Í seinna hálvleiki hevði heimaliðið gott tak á. Tær løgdu harðliga fyri, og øktu leiðsluna upp í 16-12, tá fimm minuttir vóru spældir. Kyndlaliðið, sum tapti báðar sínar fyrstu dystir í ár, var við undirlutan, og tað var stórt stríð hjá teimum at halda fast í vágaliðnum, so tað ikki fekk avgerandi leiðslu í dystinum.

Tað var ikki minst takka veri Lotte Sørensen, at Kyndil elti Sóljuna restina av dystinum. Seinastu 20 minuttirnar gjørdi Lotte 8 av teimum 12 málunum, sum Kyndil fekk.

Hjá heimaliðnum var mest sum talan um ein einmansher, tí nýggi spælari teirra, Asta Petrauskiene, skoraði heili 15 av málunum hjá vágaliðnum. Men hesi 15 málini skulu vísa seg at verða eitt mál ov lítið.

### Endaspurturin

Miðskeiðis í seinna hálvleiki javnaði Kyndil leiðsluna hjá Sóljuni. Heimaliðið fekk ein spælara útvístan í tveir minuttir, og tað tóktist nerva heimaliðið eina góða løtu. Kyndil skoraði trý mál næstu minuttirnar, og so vóru tær framman fyri 19-18.

Men júst útvísti vágaspælarin, Herta Simonsen, kom aftur á vøllin og syrgdi fyri, at Sóljan fór fram um við tveimum málum aftur, og tá tað restaðu seks minuttir av dystinum var støðan 23-21 til Sóljuna.

Tað var tá, at havnaliðið setti sín endaspurt í gongd, og við tveimum málum hjá Lotte Sørensen og einum í parti frá Anniku Ljósstein og Palmu Petersen fór Kyndil fram um 25-23. Í seinasta minutti skoraði Sóljan aftur, men tá var sigurin gloppin teimum av hendi.

Tað var stórt vónbrot fyri heimaliðið, at tær ikki kláraðu at halda leiðsluna, sum tær høvdu stóran part av dystinum, meðan Kyndil við góðum endaspurti fekk fyrstu stigini í kappingini í ár.

### Dysturin í tølum:

**Sóljan-Kyndil 24-25 (13-11)**

Málskjúttar:
Sóljan: Asta Petrauskiene 15 (3), Herta Simonsen 4, Fía Selma Nielsen 2, Sólja Jóanisdóttir 2
Kyndil: Lotte Sørensen 10 (3), Annika Ljósstein 4, Palma Petersen 4, Marna Vatnsdal Rubeksen 2, Anja Johannesen 2, Ann Hansen 1, Laila Jespersen 1, Erla Smidt 1.
Brotskøst: Sóljan 4, Kyndil 8
Útvísingar: Sóljan 2, Kyndil 1.
Dómarar úr VÍF: Sámal Joensen og Agnar Joensen





*Haakon Carlsson avmyndaður á Kondittarínum í Havn dagin fyri fráferðina til San Francisco.*
*Mynd: Álvur Haraldssen*

60 ára gamli Haakon Carlsson:

# Hittir systir sína fyri fyrstu ferð

**Í dag flýgur 59 ára gamli Haakon Carlsson til San Francisco at vitja 80 ára gomlu systir sína fyri fyrstu ferð. Hóast hann hevur vitað, at hann hevur havt eina systir í Amerika í fleiri ár, hevur hann ongantíð gjørt nakað við hetta fyrr. Nú spreiðir hann veingirnar og flýgur til USA fyri at heilsa uppá hana og familju hennara**

FAMILJA
*Ingrid Bjarnastein*

Húsini við bláu hurðini í Sløttulíð í Havn eru karmur um samrøðuna. Her býr Haakon Carlsson, ein eldri maður við brillum, yvirskeggi og gráum hári.

Haakon Carlsson skal í dag flúgva til San Francisco at vitja 80 ára gomlu systir sína, Alda Nab, sum býr í lítla býnum Lodi, eystanfyri San Francisco. Hann hevur ongantíð møtt henni áður, og er hetta somuleiðis eisini hansara jomfrúferð til USA.

### Ikki nakað nýtt

Haakon Carlsson er føddur við Rættará í Havn, og hann hevur búð her alt sítt lív. Hann er giftur við konu úr Hósvík og saman eiga tey tríggjar dreingir. Seinastu 25 árini hevur Haakon starvast í sveisingarhandlinum í Havn.

Upprunaliga hevur Haakon Carlsson trý systkin. Men harafturat átti mamman fimm børn áðrenn. Pápin, íslendingurin Ferdnand Herman Carlsson, átti tvær døtur í Íslandi, sum hann tó ongantíð fortaldi føroysku børnunum um.

– Pápi fortaldi okkum ongantíð um systrarnar í Íslandi. Ikki fyrr enn hann doyði í 1960, fortaldi mamma okkum um tær, og stutt eftir kom onnur teirra til Føroya á vitjan, greiðir Haakon frá. – Alda, tann, sum eg nú skal vitja er hin systirin, sum eg jú ongantíð havi møtt áður, men havi vitað um leingi. Hon varð gift við einum amerikumanni beint eftir kríggið, og flutti yvir har.

### Kennist undarligt

– Eg ætli mær yvir til teirra at møta familjuni, siga góðan dagin og heilsa uppá tey, sigur Haakon.

– Sjálvandi eri eg eitt sindur fjálturstungin, men eisini spentur. Vit hava tosað fleiri ferðir í telefon, skrivað brøv og sent bíløt. Nú er manglar bara at síggja menniskjuni aftanfyri. Tað kennist undarligt, men eg eri ógvuliga spentur at vita, hvat kemur burturúr.

### Ikki lætt

Haakon Carlsson hevur ferðast runt ymsastaðni í Europa fyrr, men hetta er hansara fyrsta ferð til eitt so stórt land sum USA.

– Tað er ikki so langt síðani, at eg fann útav, hvør systir mín yvirhøvur er. Eg havi jú leingi vitað, at eg eigi eina systir í Ameriku, men eg havi ongantíð vitað, hvar ella hvat eftirnavn hon hevur. Men tá ein systirsonur fór til California at spæla eina plátu inn, fór hann at vitja familjuna har, og fekk eg so bústað og telefonnummar frá honum. Eg ringdi so til teirra og presenteraði meg, og tey vórðu ógvuliga glað at hoyra frá mær.

Haakon sigur, at tað verður ikki lætt at fáa eitt bróðursystir samband í lag. Tey hava hóast alt ikki havt nakað samband alt lívið.

– Eg eri sjálvur ikki ungur longur, og Alda fyllir 80 ár komandi vikuskifti, so ongin veit um vit yvirhøvur møtast aftur, sigur Haakon. – Eg vóni bert, at alt gongur væl. Familjan har yviri er jú á ein hátt fremmand, og á ein hátt kenni eg tey, tí eg havi tosað við tey og tí vit hava skrivað saman.

– Men Alda eigur jú fleiri børn og vit eiga børn, og kanska tey einaferð í framtíðini fara at koma hendan vegin. Ongin veit, hvat kann henda, sigur Haakon Carlsson, sum nú er á veg til San Francisco.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!